# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Størri virðing fyri teimum eldru

Nú er nýggja árið tríggjar vikur gamalt, og vit hava vant okkum at skriva 2009. Dagarnir eru farnir at leingjast aftur, og ljósið troðkar myrkrið burtur fyrr á morgni og heldur tí burtur longri út á seinnapartin, enn tað gjørdi um jóltíðir.

At dagarnir eru farnir at leingjast sigur ikki tað sama, sum at veturin er av. Longsti dagur er tveir dagar undan jóansøku, og tað plagar at verða sagt, at hásummarið er millum søkurnar – jóansøku og ólavsøku. Nú er hávetur, og vit kenna tað á veðrinum. Tað rínur og hvínur í hvørjari sprekku, og avfallið er nógv.

Um jólini er alt so upplýst, og nú øll ljósini og alt prýðið er pakkað saman fyri hesu ferð, kennist tað hjá fleiri tungt og møtimikið. Skilagóði veteransálarfrøðingurin segði í Degi og viku nú eitt kvøldið, at besti heilivágurin hjá teimum, sum kenna seg tyngd og troytt, er at smoyggja sær út fyri dyr og at ganga túrar.

Føroyar eru eitt fínt samfelag at búgva í. Tað kann gott vera, at veðrið er harðførari og at tað er berligari og kaldari, enn tað er so nógva aðra staðni, men vit hava so nógv annað at fegnast um: livifóturin er høgur, persónliga frælsið er stórt, familjubondini tøtt og sterk og so nógv annað, sum ikki er ein sjálvfylgja so nógva aðra staðni.

Kortini er tað nógv, sum kundi verið øðrvísi, og tað eru tey, sum við góðum rætti kunnu siga, at tey kenna seg ikki nóg væl viðfarin, og at tað almenna í verki ikki vísir teimum nóg dyggan stuðul.

Eitt nú tey eldru. Tíbetur er lívsgóðskan hjá nógvum teirra nú so góð, at tey upp í høgan aldur eru før fyri at búgva heima hjá sær sjálvum, og fólkapensiónin og samhaldsfasti og hjá øðrum krígspensiónin, privatar uppsparingar og arbeiðsmarknaðarligar eftirlønir gera, at tað ber til.

Hesi hava seinastu árini havt tilboð um at vitja í dagtilhaldum kring landið. Dagtilhaldini hava fingið støðugt størri undirtøku – fyrst millum konufólkini og nú eisini mannfólkini – og dagtilhaldini eru við til at hækka lívsgóðskuna hjá eldru medborgarum okkara. At stuðulin til rakstur av dagtilhaldunum nú verður tikin burtur er púra við síðuna av og má metast at vera ein misskiljing, sum eigur at verða rættað beinanvegin.

Verri er statt, tá ið tað hevur við teir av okkara medborgarum at gera, sum hava brúk fyri røktarheimsplássum. At hundrað hava akuttan tørv á plássi, sum tað er ikki er nøkur vón fyri, at tey skulu fáa innan rímuliga tíð, er ógvuliga óvirðiligt og lítið sømiligt fyri samfelag sum okkara.

Fleiri kommunur hava við sambýlum tikið uppgávu á seg og loyst tørv, sum landið átti at havt syrgt fyri. Tað er óvirðiligt, at røktarheimsspurningurin ikki hevur hægri raðfesting, enn hann tykist at hava. Hjá teimum, sum tørva hjálp, og teirra avvarðandi, er tað torført at síggja glottan í gerandisdegnum. Seinastu árini eru tøk tikin á røktarheimsøkinum, men framvegis er hetta takið eitt tað største, sum okkara samfelag hevur eftir at taka.

**Sosialurin**

## Hættislig umhvørvisdálking

THOMAS MICHAEL SMITH



Nú tað er so umráðandi at gera alt, sum til ber fyri at verja okkara umhvørvi fyri dálking, undrar tað meg meira og meira, hví ikki meira verður gjørt burtur úr at lóggeva um málingartilfar.

Meira og meira verður koyrt burtur av málingarestum, og uttan iva er ein høvuðsatvoldin til hetta, at tær smæstu nøgdirnar, ið eru at fáa til keyps í dag verða størri og størri. Lítið er at ivast í, at hetta verður gjørt fyri – sum tað nú so vakurt eitur – at rationalisera. Sum dømi kann eg siga frá, at í trýssunum kundi tú keypa 1/16 litur av lakki, ið var nóg mikið til at mála okkurt smáting, sum var ein hálvan fermetur ella so, og so var lítið og einki avlop, ið skuldi blakast burtur.

Nú er veruleikin tann, at spyrt tú eftir máling til eitt pinkalítið arbeiði – ein vindeygakarm ella eitt súkklustell – so er svarið, at tann støddin fæst ikki longur. Fyri bara einum hálvum ári síðan kundi mann fáa ein hálvan litur av eini ávísari máling. Nú hálvt ár aftaná skuldi eg brúka eitt sindur aftrat av hesi máling og bað um at fáa ein hálvan litur, og svarið var: "Hálvur litur er útgingin, vit hava ikki minni enn ein litur ..."

Eigur tú fýra fittar krakkar, sum tú kundi hugsað tær at mála í hvør sínum liti, til dømis við reyðum, svørtum, hvítum og grønum, so fært tú fýra litrar til samans av máling. Lokið fer av blikkinum, og pensilin verður dyppaður nakrar fáar ferðir niður í hvørt. Einki sæst vera fjarað í liturblikkunum. So er ikki brúk fyri meira av hesi málingini. Upprunaliga vórðu keyptir fýra litrar av máling, sum fyrr ella seinni endar á Sandvíkahjalla, og samanlagt eru næstan fýra litrar eftir í hesum blikkunum við sera dálkandi burturkasti.

Tað er so mikið sum, at málingarfabrikkirnar í Europasamveldinum putlast ikki við smátingum sum er minni enn heilir litrar av flestu málingavørum. Tað gongur eisini so skjótt, at ein kann bara bíða eftir, at um skamma stund fæst ikki minni enn tíggjulitra blikk av vanligari máling.Tað er mær ein gáta, at málingafabrikkirnar í ES fáa loyvi til slíkt svínarí.

Meðan eg eri við hesa óneyðugu dálkingina, so undrar tað meg eisini stórliga, at í flestu handlum ber ikki til at keypa eitt einkult battari. Tey eru aloftast pakkað tvey, fýra ella fleiri saman. Heilt upp í tíggju kunnu tey vera pakkað, og sigur tú, at tú bara skalt brúka eitt ella tvey, so er svarið: "Jú men, hesi kosta minni enn eitt ella tvey einkult í leysari vekt."

Tey allarflestu vita, at hini, ið "leypa av", enda eisini uppi á Sandvíkahjalla sum sera vandamikið burturkast.

Sleppa vit sjálv at lóggeva um sovorðnar trupulleikar í okkara egna løgtingi uttan um ES, ella hvat?

## Er Marknaðarføringarlógin meint sum skemt?

PETUR Í GONG

Brúkarasamtakið



Í knappan mánað er nýggja marknaðarføringarlógin sloppin at virka. Sum heild ein væl móttikin lóg, og hartil hart tiltrongd. Men skal hon tæna sínum endamáli, er neyðugt, at allir partar virða hesar nýggju spælireglur. Ikki bara nakrar einstakar greinar, ið passa til ein sjálvan, men alla lógina.

Týskvøldið varð borið út eitt lýsingablað frá Skemmuni. Blaðið segði seg sjálvt vera galdandi frá 4. januar til 17. januar, og var sostætt ikki galdandi longur, hóast tað júst er komið í postkassan. Tað í sjálvum sær er villleiðandi marknaðarføring, og harvið brot á triðju grein í marknaðarføringarlógini.

Víðari kundi staðfestast, at blaðið ikki var á føroyskum máli. Eitt greitt brot á sjeyndu grein a, ið sigur, at "Lýsingar og lýsingatilfar, sum er beinleiðis ætlað brúkarum í Føroyum, skal vera á føroyskum". Greinin er greið í orðum, so her er ilt at ímynda sær, at man við eini kunngerð kann siga, at tað kortini ikki nýtist at vera á føroyskum.

Brúkarasamtakið boðaði beinanvegin Skemmuni frá mistøkunum, men ætlaði ikki at gera meira við málið. Orsøkin til, at vit nú kortini gera vart við okkum, er, at vit í tíðindunum hjá Kringvarpinum mikukvøldið fingu ta fatan, at Skemman og Prentmiðstøðin ikki mettu seg vera umfatað av lógini. Vinnumálaráðið skuldi hava gjørt eina broyting, ið tíðindini tó ikki greiddu nærri frá, og tí kundi blaðið berast út. Vit meta tað vera av størsta týdningi fyri føroysku brúkaran, at henda skeiva fatan av nýggju marknaðarføringarlógini verður jarðað beinanvegin. Lógin er greið, og eigur at verða vird av øllum pørtum. Byrjar man at pilka okkurt burturúr, tí tað ikki hóvar einum, kann vera skjótt, at einki er eftir.

Nýggja Marknaðarføringarlógin leggur upp til samstarv millum Brúkaraumboðið og vinnuna. Meiningin er ikki, at alt og øll skulu trumlast niður av einum snævurskygdum brúkarakóboy, men at man finnur útav tingunum í einum semjusøkjandi anda, tí trygga marknaðinum at frama. Tí er lógin ikki beinleiðis skipað sum ein lóg, ið handilsfólk skulu revsast eftir. Kortini hevur Brúkaraumboðið heimild til at áleggja vinnuni ávísar mannagongdir. Verða hesar ikki fylgdar, ber til at krevja revsing. Men tað átti ikki at verið neyðugt.

Lógarásetta Brúkaraumboðið, ið av røttum skuldi verið farið til verka tann 1. januar, tykist vera komið í drag. Hetta, hóast peningur er játtaður. Tí er lógin fyribils løgd til Fjarskiftiseftirlitið at umsita. Men tað kann tykjast óskiljandi, at man, hóast tøkan pening, ikki setur hetta so týdningarmikla starv.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.